






## STÓRA TØKK FYRI STUÐULIN

Við hesum vilja vit siga stóra tøkk fyri stuðulin, ið varð latin Opera.fo til “Hevur tú sæð Carmen?”.
Leikurin varð framførdur á Tjóðpallinum 17.-19. januar og í Varpinum 1.-2. februar 2025, og var sýningin sera væl móttikin.

Tilsamans vóru 24 gentur í aldrinum 9-15 ár knýttar at verkætlanini. Ein leikbólkur við 8 gentum spældi leikin, við replikkum, sangi, dansi og ljóðførum, og haraftrat vóru tvey kór; 8 gentur úr Havn, til sýningarnar á Tjóðpallinum, og 8 gentur úr Klaksvík, til sýningarnar í Varpinum.

Ein tílík verkætlan er ómøgulig at seta upp uttan góðan stuðul, og tí eru vit so takksom fyri, at MáF enn eina ferð hevur veitt so góðan stuðul til Opera.fo.

Enn eina ferð takk fyri og blíðar heilsanir
Birita Adela Davidsen, vegna Opera.fo
Tórshavn, 18. februar 2025





Myndir: Eyðbjørn Jacobsen, Varpið 2025

## UMMÆLI

*Í kalda myrkrinum lat ein annar heimur seg upp fyri okkum, tá genturnar og eg leitaðu okkum innar í Varpið í gjárkvøldið. Og meðan vindurin leikaði í uttanfyri, sótu vit rúnarbundnar undir hvørjum orði, hvørjari rørslu og hvørjum tóna, tá so inniligar og sjarmerandi operettur gjørdu pallin livandi við sjónleiki og ljóðførum, sangi og dansi. Og hóast ungar, so havi eg sjáldan upplivað ein so hugtakandi stemning sum hesa løtuna í Varpinum.*

*At kveikja áhugan hjá børnum og ungum fyri opera er helst ikki ein løtt uppgáva. Men Birita Adela Davidsen, sum eigur handritið og hevur leikstjórnað, hevur uppiborið allar heimsins stjørnur fyri at gera leikin livandi og inniligan. Og á tann hátt eisini viðkomandi fyri børnum og ungum. Hetta var ein stuttlig, ein rørandi og ein hugvekjandi løta saman við gentunum.*

*Á trappuni í myrka foyerinum gloymdu vit alt um veður og vind og lótu okkum ístaðin sveima avstað við tónum frá m.ø. Toreador og Habanera úr kendu operuni "Carmen" eftir franska Georges Bizet. Hesar ungu operetturnar lótu upp ein vakran heim, sum eg havi hug at vitjað aftur og aftur. Ja, fleiri ferðir, vónandi!* ✨

*Takk fyri løtuna!* 🌹

- Ragnhild Ellingsgaard, 3. feb. 2025